## Markovic tvey ár á Skála



Predrag Markovic, sum seinastu árini hevur vart málið hjá TB, skal spæla fyri Skála næstu tvey árini. Heimasíðan hjá Skála skrivar, at felagið nú um dagarnar gjørdi eina tvey ára avtalu við Markovic.

- Tað er einki yvir at dylja, at Predrag er fram úr góður málverji. Hann hevur mangan roynst tvøramonnum stinnur, og nú vóna vit á Skála, at hann fer at roynast okkum líka stinnur, skrivar heimasíðan hjá Skála.

Markovic skal loysa Vlada Filipovic av í málinum hjá Skála. Vlada hevur leikt við Skála seinastu tvey árini, men nú eru partarnir komnir ásamt um at fara hvør sín veg.

## Cech úti í eitt ár

Chelsea-málmaðurin Petr Cech fekk skallabrot í dysti leygardagin, og hann varð um vikuskiftið lagdur undir skurð.

- Sonur mín kann ikki spæla fótbólt næsta árið. Tað var ikki fyrr enn eg fekk hesi boð, at eg skilti, hvussu álvarsom støðan hjá honum er, sigur pápin, Vaclav Cech, við The Times.

Petr Cech varð raktur í høvdið av knænum hjá Reading-spælaranum Stephen Hunt og mátti í skundi flytast á sjúkrahús. Seinni var hann skurðviðgjørdur, og nú er ein langur steðgur frá fótbólti fyri framman.

## Alt fólkið tøkt

**B36-SKÁLA**

*Eyðun Klakstein*
*eydun@sosialurin.fo*

Skála hevur allar sínar spælararnar tøkar til dystin ímóti nýkosnu steypavinnarunum í kvøld

Leygardagin vann B36 steypafinaluna í fótbólti, og í kvøld skulu teir manna seg upp til dyst í Formuladeildini, sum hevur fingið minni at siga, eftir at liðið hevur tryggjað sær gull og europeiska luttøku. Men B36 hevur framvegis bronsumerkini at stríðast fyri. Mikkjal Thomassen og Obi eru báðir tøkir aftur eftir leikbann í steypafinaluni.

Skála hevur alt sítt fólk tøkt til dystin. Pauli G. Hansen noyddist at gevast í landsdystinum ímóti Fraklandi orsaka av skaða, men hann verður væntandi førur fyri at spæla við ímótu B36. Tað verða eisini allir hinir spælararnir í Skála-hópinum.

## Grannadystur í Klaksvík

**KÍ-GÍ**

*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

KÍ hevur framvegis ein kjans at vinna heiðursmerki í ár, meðan GÍ hevur lítið uttan heiðurin at spæla fyri

KÍ og GÍ spæla í Klaksvík í kvøld. Dysturin millum grannarnar hevur ikki sama týdning hesaferð, sum hann hevur havt áður. GÍ hevur so at siga einki eftir at spæla um, meðan KÍ skal royna at taka bronsuplássið frá B36.

Sámal Joensen, sum hevur verið sera drúgvur á miðvøllinum hjá GÍ í ár, verður ikki við í Klaksvík. Hann er skaddur í knænum og spælir ikki við í seinastu tveimum dystunum.

KÍ hevur verið við í endabrestinum í steypakappingini, men mátti lúta fyri B36 í finaluni. Nú skulu spælaranir fóta sær eftir stóra vónbrotið, og allir spælararnir hjá KÍ eru tøkir í kvøld

# Liðkapping í triathlon

**Sunnudagin 15. oktober skipaði Føroya Triathlon Felag fyri liðkapping í triathlon. Átta lið vóru við í kappingini hesaferð**

**TRIATHLON**

*Tíðindaskriv*



*Luttakarar í triathlon-kappingini fyri lið, sum varð hildin um vikuskiftið.*

Triathlon er samansett av trimum greinum, nevniliga svimjing, súkkling og renning, og tí vóru tað trý fólk, ið mannaðu eitt lið.

Tá kappast verður í liðkapping verður svomið 750 metrar, súkklað 20 kilometrar og runnið 6 kilometrar.

Føroya Triathlon Felag hevur fyrr skipað fyri slíkari kapping og undirtøkan hevur verið rættiliga góð. Eisini í ár var undirtøkan góð, heili 8 lið vóru við í kappingini. Tað varð kappast millum millum kvinnulið, manslið og so var eisini møguligt at kappast við blandaðum liði.

**Tríggir úrmælingar**

Kappingin var í Havn, og svimjingin var í Svimjihøllini í Gundadali, og síðani varð súkklað og runnið í Havnini.

Hóast hetta var ein liðkapping, so vóru tað tó 3 úrmælingar, ið stungu seg framur.

Í svimjingini var tað 14 ára gamli svimjarin Høgni Miné-Rasmussen, ið beinan vegin legði seg í oddin. Eisini var hann skjótastur at renna til súkklaran, og senda hann út á súkkluteinin.

Í súkklingini vísti 16 ára gamli Torkil Weyhe, at tað ikki var av tilvild, at hann herfyri vann FM í tíðarsúkklina. Á súkkluteininum vant hann burtur úr øllun hinum súkklarunum, sum nú bara mugu siga: "Hann er farin".

Tá farið var til renningina, løgdu nógvir rennarar út sum óløgir, men ikki "The Old Grand Man" Óli Olsen, sum rann fyri liðið Grand Old Men. Hann helt seg báðu megin teir 4 min. tey fyrstu 5 umførini, og ikki fyrr enn á seinasta umfari setti hann ferð á, og kom á mál sum skjótasti rennarin.

Kappingina hjá monnum vann liðið skulin.fo. Liðið var mannað við Høgna Miné-Rasmussen, Sigmundi Olssonog Árna Gullborg Nielsen.

Hjá blandaðum liðum vann Team B-T-R, sum var mannað við Bjørg Seloy, Torkil Veyhe og Rannvá Djurholm.

# HB brynjar seg til næsta ár

**Fleiri av ungu monnunum hjá felagnum hava longu longt sáttmálan, og hartil tykjast spælarar sum Milan Culic og Marcyn Dawid verða á veg til felagið**

**FÓTBÓLTUR**

*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Í HB verður altíð sagt, at meddað verður ovarliga. Soleiðis var eisini í ár, hóast setningurin fyrst og fremst var at byggja bulin til eitt lið, sum komandi ár skal vera við til at seta sín dám á føroyska fótbóltstoppin.

Enn stendur liðið eisini við møguleikanum fyri FM-gullinum fyri 2006, men hóast hetta ikki skuldi borið til, so er lítið at ivast í, at flestu av viðhaldsfólkunum er væl nøgd um silvurmerkini, sum spælararnir undir øllum umstøðum hava tryggjað sær. Og mest sum allur hópurin frá í ár heldur eisini fram. Seinast hava Emil Leifsson Nolsøe og Rasmus Nolsøe skrivað nýggjan sáttmála.

**Kulic**

Men tað tykist, sum arbeiðir leiðslan í felagnum eisini við møguleikum fyri tilgongd. HB váttar nú, at Milan Kulic í 2007 fer at spæla við HB. Hann og felagið høvdu annars gjørt sáttmála fyri 2006, men tá arbeiðs- og uppihaldsloyvið skuldi útskrivast, vóru nøkur formkrøv, ið ikki vóru uppfylt.

Nú er tó greitt, at Milan verður á HB-miðvøllinum komandi kappingarár, og hann verður ikki einasta tilgongdin, skilst. Bárður Johannesen hevur vart HB-málið í fleiri enn 300 dystum, men hann hevur ikki boðað greitt frá, um hann heldur fram næsta kappingarár. Tað hevur í fleiri vikur ljóðað, at avloysarin er at finna hjá VB/Sumba, og tó at tað ikki verður váttað, so tykist tað vist, at Marcyn Dawid verður maðurin, sum skal loysa Bárð av, um hann ikki heldur fram.

**Álopsstyrk**

Og eisini frammi í álopinum skilst, at HB hevur leitað eftir styrki. Christian Høgni Jacobsen er uttan iva heitast føroyska álopsnavnið, og tað tykist, sum er stórur áhugi fyri honum.

Ætlanin var, at hann skuldi fara til Danmarkar at spæla, men tað er ikki vist. Bæði havnarfeløgini og NSÍ vilja hava Christian Høgna at spæla fyri seg, um hann verður verandi í Føroyum. Men samstundis ljóðar, at hann skal av landinum at royndarvenja í næstum.

Sjálvur vil runavíkingurin tó einki siga um sína fótbóltsframtíð.

- Tað er ein spurningur, sum væntandi verður avklárað ein av fyrstu døgunum. Og eg havi ongar viðmerkingar til tær gitingar, sum eru at hoyra, sigur Christian Høgni Jacobsen.